

TILTAK FYRI ÚTFLUTNINGSVINNUNA

Fá tað besta burtur úr messuni

At sýna fram á stevnum er eins og onnur marknaðarføringsátøk ein íløga. Sjálvsagt skal luttøka á stevnum vera lønandi eins og aðrar íløgur. 25. februar fær tín fyritøka møguleika fyri at fáa vitan, hugskot, íblástur og dømi um, hvussu tit kunnu betra tykkara úrslit, tá ið tit taka lut á stevnum.

Mikael Jansson, er ein tann mest vitandi fyrilestrarhaldarin í Evropa um evnið. Í fleiri enn 20 ár hevur hann gjørt kanningar og ráðgivið størri og minni fyritøkum um, hvussu tær kunnu fáa eitt betri úrslit, tá ið tær taka lut á stevnum.

Tiltakið er ætlað útflutningsvinnuni. SamVit skipar fyri.

**Nær:** Mikudagin 25. februar klokkan 11-16
**Hvar:** Norðurlandahúsið
**Kostnaður:** 500 krónur pr. persón, íroknað prísin er ein løtt máltíð
**Tilmelding:** Umvegis t-post til samvit@samvit.fo ella á tel. 306900
**Tilmeldingarfreist:** Mánadagin 23. februar
**Tilfar:** Allir luttakarar fáa bókina "The Exhibition Guru" eftir Mikael Jansson

sansir.fo



**MIKAEL JANSSON**
Hann er stjóri og partaeigari í Scandinavian Survey Group. Hann stendur eisini á odda fyri the Exhibition Guru training project, sum hvørt ár mennir yvir 4.000 fólk. Til dømis hevur hann ráðgivið Ericsson, Saab Defence Industry og Wärtsilä.

**THE EXHIBITION GURU**
Kenda bókin hevur undirheitið "The Art of Exhibiting at Trade Shows and How to Make Money From It". Mikael Jansson hevur skrivað bókina.

SamVit

Bryggjubakki 12 · P.O.Box 118 · 110 Tórshavn · Tel. 30 69 00 · Fax. 30 69 01 · www.samvit.fo



# Bygdirnar eiga lut í havnargjaldinum

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður vil hava at vita, um landsstýrið hevur ætlanir um at gera eina útjavningarskipan fyri vørugjald, nú allur farmaflutningur fer um havnalagið hjá høvuðstaðarkommununi**

FARMAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Allur farmaflutningur til og úr Føroyum, verður fluttum um bryggjukantin í Havn. Tískil er tað bara Tórshavnar Havn, sum fær havnargjald í Føroyum. Hetta heldur Kári P. Højgaard ikki vera rættvíst. Hann hevur tí sett Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, munnligan fyrispurning í hesum sambandi.

Kári P. Højgaar sigur, at tá Skipafelagið Føroyar hevði farmaflutning, høvdu teir avgreiðslur í teimum størru plássunum: Tórshavn, Saltangará, Klaksvík, Tvøroyri og Fuglafjørður vóru upp- og avskipingarhavnir, og fingu tær havnar, brúgvar- og vørugjøld.

- Hesar kommunur hava gjørt rættuliga stórar íløgur í havnaløg, og pakkhús eru bygd á havnaløgunum til sama endamál, sigur Kári P. Højgaard.

Hann sigur, at høvuðsreglan hevur verið, at vørugjaldið verður goldið fyri vøruna, sum fer um bryggjukantin.

- Trupulleikin er, at allar hesar kommunur, sum í dag sita við vælútbygdum havnaløgum og ongari skipaferðslu, framhaldandi skulu taka ímóti bingjunum á havnaløgunum. Tær verða fyltar eins og áður, men í staðin fyri at verða lossaðar umborð á skip, kemur ein trailari og dregur bingjurnar einar 50 til 70 kilometrar til Havnar, og fáa kommurnar tí einki inn í vørugjaldi. Í Suðuroynni er sama skilið, tí har skal allur farmur, í og úr oynni, fraktast við Smyrli. Kommunurnar í oynni fáa tískil heldur onga krónu í vørugjaldi, tí vøran kemur og fer við Smyrli og ikki beinleiðis við farmaskipinum, sigur tingmaðurin.

Spurningurin er, um landstýriskvinnan heldur tað vera rímiligt, at øll inntøka av farmaflutningi kemur einari kommunu til góðar, sigur Kári P. Højgard. Munnligir fyrispurningar eru á skránni á tingfundinum í morgin.